## Maria um føroyska veðrið

Eg elski harða veðurlagið í Føroyum. Tað hevur givið mær styrki. Eg gerist ikki ótrygg í nógvum vindi. Men eg eri eisini errin av føroysku náttúruni og veðrinum, og eg tosi ofta um tað. Eg kann gott fáa eitt "kick" av stórsligna veðurlagnum í Føroyum – eins og eg fái tað av tónleiki.



## … um kvinnufótbólt:

Eg eri B36'ari og stóð á odda fyri at stovna kvinnufótbólt í Føroyum. Vit savnaðu undirskriftir tann tíð tað var, og í dag er kvinnufótbóltur kring alt landið, og tað er super. Men eg haldi ikki, at tað sær gott út, tá kvinnur spæla bólt, og eg haldi, at tað er stuttligari at spæla fótbólt enn at hyggja at tí.

# Ferðin hjá Mariu ígjøgnum tónleikin

**Hon flutti úr Føroyum, tí hon kendi seg innilokaða og eygleidda. Í 1992 mundi eitt óhapp gjørt enda á tónleikaleiðini hjá henni, men hon stríddi seg aftur, og nú hevur Maria Guttesen latið sítt dreymaverk úr hondum. Vit hava hitt føroyska songfuglin í Århus, sum altíð hevur havt tónleikin hjá sær**

## Portrett



**Solby A. Eliasen**
solby@mail.djh.dk

Ein smágenta gongur og heintar tómar sodavatnsfløskur. Eitt kent fyribrigdi millum børn, tí fløskurnar kunnu avreiðast og so ber til at keypa góðgæti. Men tað er ikki endamálið hjá hesari smágentuni. Smágentan er Maria Guttesen, og hendan dagin er hon stødd á Zarepta saman við nógvum øðrum børnum.

Maria heintar fløskurnar og fyllir vatn í tær. Hon fyllir í eina flødsku, blæsir í hana og lurtar. Um ljóðið ikki hóvar henni, stoytir hon annaðhvørt eitt sindur úr ella fyllir meira í. Soleiðis arbeiðir hon seg ígjøgnum fløskurnar, til allar hava fingið passandi mongd av vatni í. Hetta tekur langa tíð, men Maria er tvør. Og tað gevur úrslit.

Tá ein rúm løta er gingin, hevur hon evnað sítt egna ljóðføri burtur úr tómum fløskum og vatni.

- Eg gjørdi mín egna durskala og spældi mín egna tónleik, greiðir Maria Guttesen frá, meðan hon minnist aftur á barnaárini í Føroyum.

Nógv ár eru liðin síðani hesa løtuna á Zarepta, og nógv er hent.

Men hóast mong ár eru liðin, ger Maria framvegis síni egnu ljóðføri, um hon hevur sett sær fyri, at hon vil hava eitt heilt serligt ljóð.

Hon reisist úr sofuni í lítlu stovuni og fer inn í kamarið. Hon ger skjótt av og kemur aftur við einari gamlari keksadós. Digestive keks.

Í dósina hevur Maria koyrt eitt sindur av brúnum rísum, síðani hevur hon klistrað lokið á dósini aftur við gaffatape. Keksadósin varð harvið umskapað til ein "shakara", sum hon javnan brúkar til sín tónleik.

Til ein annan heimagjørdan shakara hevur hon blandað eitt sindur av nudlum og sukri saman. Nudlurnar gera, at ljóðið verður eitt sindur tyngri, meðan sukrið gevur dryss-ljóðið.

- Eg tími ikki at keypa shakarar úr handlum hvørjaferð, tí teir ljóða allir eins, greiðir Maria frá.

### Ungt talent

Maria Guttesen kemur úr kendari og tónlistarligari familju. Abbi hennara var tónleikalærari og undirvísti í heiminum. Pápi hennara spældi gittar, og hann lærdi Mariu fyrstu fýra ella fimm akkordirnar.

Evnini til at spæla tónleik komu tó til sjóndar, langt áðrenn Maria var nóg gomul til at kunna spæla upp á ljóðføri. Longu, tá hon var heilt lítil, var tað greitt, at hon hevði fingið eina heilt serliga gávu.

- Um eg sat á gólvinum, meðan mamma vaskaði upp, byrjaði eg at vagga í takt við rørslurnar hjá henni og ljóðini, sum komu frá tí, sum mamma tókst við, sigur Maria flennandi.

Ljósa hárið er greitt í ein lítlan hestahala niðarliga á nakkanum. Eyguni eru blá, og tey glógva, meðan hon tosar um tónlistarlig minni frá barndómi sínum, tá alt byrjaði.

Í barndómsheiminum í Havn stóð ein pumpuurga. Tað var fyrsta ljóðførið, sum Maria og systkin hennara spældu uppá.

- Vit dugdu als ikki, men tvey fingu ábyrgdina av at pumpa, meðan ein slapp at spæla, minnist Maria afturá. Hon situr still á sofuni við beinunum uppi undir sær.

Brádliga setist hon upp, og meðan fingrarnir spæla klaver á borðkantinum, greiðir hon frá, at tónleikurin altíð var inni í henni. Hon smoyggir ermarnar upp, soleiðis at hon betur fær hildið fram við spælinum á sofaborðinum.

Síðani steðgar klaverspældið brádliga, og hon sigur bart út:

- Um onki ljóðføri var í nánd, og eg fekk hug at spæla tónleik, brúkti eg tunguna hjá mær, tenninar ella hendurnar. Ljóðføri var ikki neyðturviligt. Eg nýtti kroppin hjá mær. Tað snúði seg einans um at fáa tónleikin út – ígjøgnum eitt ella annað.

### Ov lítið samfelag

Maria Guttesen flutti til Danmark-ar, tá hon var 20 ára gomul.

Hon hevði tørv á at vera anonym, og tað helt hon ikki bera til í Føroyum. Lítla samfelagið, har øll kenna øll, gjørdist ov trongt.

- Eg kendi tað, sum var eg í einum kupli, sigur hon og hugsar eina løtu.

- Sum um eitt ella annað var inni í mær, sum vildi fram. Eg var ov bundin, samfelagið var ov lítið og fólk vóru bara ov nógv politi og hildu eyga við hvørjum øðrum ístaðin fyri at skapa eitt gott lív fyri seg sjálvi, sigur hon.

Tað var ein stór avbjóðing fyri føroysku songkvinnuna at flyta av klettunum fyri umleið 20 árum síðani. Men hon mátti lurta eftir kenslum sínum og trongdini at víðka sjónarringin.

Maria situr still og hugsar. So hyggur hon upp undir loftið, meðan hon tekur í oyralippuna og fer at tosa um lágt sjálvsálit.

- Í grundini eri eg ein ræðuskítur, tá tað kemur til stykkis. Nógv siga, at eg tykist so sjálvsikkur, men tá tey koma at kenna meg, varnast tey, at tað einans skal eitt lítið skump til tess at fella meg, sigur hon síðani og vísir við fingrunum, hvat hon meinar við.

### Slettaður harddiskur

Lága sjálvsálitið hjá Mariu versnaði í 1992, tá hon fekk ein álvarsaman heilaskjálvta í einum óhappi.

Um hetta mundið arbeiddi hon í einum barnagarði, meðan hon framførdi og undirvísti í tónleiki við síðuna av.

Hon lá á øllum fýra inni í einum spælihúsi og skuldi hjálpa einari smágentu. Tá Maria skuldi út aftur úr lítla húsinum, gloymdi hon, hvar hon var stødd og reisti seg upp at standa. Hon langaði høvdið so hart í takið á lítla húsinum, at hon misti vitið.

- Tað einasta, eg minnist, er ljóshærda gentan, sum stóð uppi yvir mær, tá eg raknaði við aftur.

Maria fór heim, tí hon var so ússalig.

Tað gingu nakrir dagar, áðrenn

Sosialurin